# Eru komin í neyð av nýggjum skipum

**Skal tað bera til hjá nýggju Norrønu og nýggju suðuroyarferjuni at leggja at í Havnini, er neyðugt at byggja út fyri 60-70 milliónir. Men landskassin má betala sín part**

SAMFERÐSLA
*Áki Bertholdsen*

Tórshavnar Kommuna er rættiliga við at koma í neyð.

Um tvey ár fer nýggj Norrøna at sigla og um trý ár er eisini ein nýggj suðuroyarferja bygd.

Hesi bæði skipini eru munandi størri enn Norrøna og Smyril, sum nú eru og tískil krevja tey eisini nógv meiri pláss.

Tórshavnar Kommuna sig-ur, at skal tað bera til hjá hesum báðum skipunum at leggja at í Havnini, verður tað neyðugt at byggja Tórshavnar Havn út fyri góðar 60 milliónir krónur.

Men tað heldur kommunan ikki, at hon skal betala einsamøll.



*Landsbyggifelagið hevur gjørt eina tekning av, hvussu økið við farstøðina á Bursatanga ætlandi fer at síggja út eftir útbyggingina. Pláss skal vera bæði fyri nýggju Norrønu og nýggju suðuroyarferjuna, tí tey fáa hvør sína ferjulegu tí ofta eru tey á Havnini ísenn*

Kommunan hevur tí bið-ið landsstýrið um at fáa stuðul til útbyggingina.

Somuleiðis sigur Tórshavnar kommuna, at útbyggingarnar kunnu ikki verða taldar upp í kvotuna, sum kommunan hevur fingið til útbyggingar.

## Fyri alt landið

Í einum brævi, sum Tórshavnar Kommuna hevur sent Vinnumálastýrinum, verður víst á, at økið við Farstøðina á Eystaru Bryggju í Havn er við at verða eitt samferðsluvegamót hjá øllum landinum.

Men nú nýggj Norrøna kemur í 2003 og nýggj suðuroyarferja í 2004, er ætlanin, at bæði skipini skulu kunna leggja at, har Norrøna og Smyril nú liggja.

Men skal tað lata seg gera, verður neyðugt við munandi útbyggingum.

Av tí, at hetta er so dýrar útbyggingar, og av tí at ferðslan á økinum má avgreiðast, mugu útbyggingarnar gerast í stigum. Harafturat ber tað bara til at arbeiða tann partin av árinum, Norrøna ikki er í summarsigling.

Tí er tað neyðugt at byrja longu 1. januar,

Í brævinum til Vinnumálastýrið, vísir Býráðið eisini á, at tænastan, sum ferðafólkið við Smyrli fær, er ikki nøktandi.

– Tíðum er neyðugt hjá Smyrli at leggja at ytst á Molandum, soleiðis at ferðafólk og bilar mugu ganga og koyra ímillum trukkar og bingjur.

– Fyri at bøta um hesi viðurskiftini, verður neyðugt at bæði Norrøna og Smyril fáa lagt at á Bursatanga.

Men skal tað bera til, verður neyðugt at skipini fáa hvør sína ferjulegu, tí mangan eru tey bæði á Havnini ísenn

Sostatt verður tað neyðugt at byggja havnalagið út fyri góðar 60 milliónir.

Hevði Norrøna sum nú er, hildið fram at siglt so at tað bara gjørdust neyðugt at byggja út til nýggju suðuroyarferjuna, hevði talan verðið um eina útbygging fyri góðar 34 milliónir.

– Útbyggingirnar til Smyril eru beinleiðis í eina samferðsluhavn og tíverður heitt á Føroya Landsstýrið um at veita okkum sama fíggjarliga stuðul, sum er veittur øðrum samferðsluhavnum, sigur býráðið við Vinnumálastýrið.

– Hetta eru útbyggingar, sum eru neyðugar fyri at tryggja suðuroyingum og føroyingum hóskandi samskifti og sum Tórshavnar kommuna tí ikki einsamøll kann bera allan kostnaðin av.

Somuleiðis vísir býráðið á, at útbyggingar, sum koma øllum landinum til góðar, kunnu á ongan hátt verða taldar upp í útbyggingarkvotuna hjá Tórshavnar Kommunu og Býráðið heitir tí á Landsstýrið um at hækka kvotuna hjá kommununi við teirri uphæddini, sum Tórshavnar Havn skal betala av útbyggingunum.

# Mugu byggja út fyri fleiri enn 60 milliónir



| Slag | Byrja | Endað | Kostnaðar-meting | Smyril |
|---|---|---|---|---|
| 1. Styrking av verandi bryggju og dýping | 1/1-2002 | 1/5-2002 | 7.720.000 | 5.500.000 |
| 2. Rampa til Norrønu/Smyril | 15/9-2002 | 1/3-2003 | 18.360.000 | 1.500.000 |
| 3. Landgongd til Norrønu/Smyril | 15/9-2002 | 1/3-2003 | 13.450.000 | 3.000.000 |
| 4. Umskiping av øki | 15/9-2002 | 1/3 2003 | 6.120.000 | 3.060.000 |
| 5. Broyting av farstøð | 15/9-2002 | 1/3-2003 | 4.400.000 | 2.200.000 |
| 6. Rampa Smyril | 1/1- 2004 | 1/5-2004 | 11.920.00 | 19.000.000 |
| Samlað | | | 61.970.000 | 34.260.000 |

Nevndu útbyggingar til Smyril, sum eru mettar at kosta kr. 34.260.000,- eru beinleiðis í eina samferðsluhavn, og vilja vit tí hervið heita á Føroya Landsstýri/Vinnumálastýrið um at veita okkum sama fíggjarliga stuðul, sum er veittur øðrum samferðsluhavnum.

Hetta eru útbyggingar, sum eru neyðugar fyri at tryggja Suðuroyingum og Føroyingum hóskandi samskifti, og sum Tórshavnar havn/kommuna tí ikki einsamøll kann bera allan kostnaðin av.

Útbyggingar, sum koma øllum landinum til góðar, kunnu á ongan hátt verða roknaðar sum ein partur av fløgukvotuni hjá Tórshavnar kommunu, og vilja vit tí heita á Føroya Landsstýri/Fíggjarmálastýrið um at hækka fløgukvotuna við tí upphæddini, sum Tórshavnar havn skal gjalda av útbyggingunum.

Við vón um skjóta viðgerð

*Her er eitt yvirlit yvir, hvussu nógv tað fer at kosta at byggja Tórshavnar Havn út, so at nýggja suðuroyarskipið og nýggja Norrøna, fáa lagt at. Ì teiginum til høgru sæst, hvat skal til Smyril burturav*



*– Vil landið ikki betala sín part og verður útbyggingarkvotan ikki hækkað, fer tað at fáa álvarsligar avleiðingar, sigur Jákup Suni Joensen, formaður í havnanevndini hjá Tórshavnar Býráð*

**Betalir landið ikki sín part av útbyggingunum, fær tað álvarsligar avleiðingar fyri nýggju Norrønu og nýggja suðuroyarskipið, sigur Jákup Sun Joensen, formaður í Havnarnevndini hjá Tórshavnar Býráði**

SAMFERÐSLA
*Áki Bertholdsen*

Tórshavnar Býráð er komin í eina rættiliga álvarsliga støðu, nú nýggj Norrøna og nýggj suðuroyarferja eru á veg.

– Skulu hesi bæði skipini hava rímiligar umstøður at koma á Havnina, er tað neyðugt at byggja út fyri yvir 60 milliónir, sigur Jákup Suni Joensen, sum er formaður í havnarnevndini hjá Tórshavnar Býráð.

Sum tað sæst á talvuni niðanfyri, er talan um rættiliga umfatandi útbyggingar. Í einum brævi til Vinnumálastýrið, hevur Býráðið sett útbyggingarnar upp í tveimum: Tað sum er neyðugt at gera til Norrønu og Smyril og tað, sum verður neyðugt at gera, um Norrøna, sum nú er, heldur fram og bara suðuroyarferjan verður skift út.

Dýrasti parturin av útbyggingini verður at gera eina nýggja ferjulegu til Smyril, uttaná ferjunleguni, sum nýggja Norrøna skal brúka, hon kostar heilar 19 milliónir.

– Men hetta er neyðugt, tí onkustaðni skal Smyril liggja, tá ið tað passar seg so, at bæði skipini koma á Havnina ísenn.

Jákup Suni Joensen sigur, at verður hetta ikki gjørt, verða umstøðurnar sera truplar hjá Smyrli, tí hann hevur ikki síðuportur og fær tí illa, ella slett ikki lagt at á Molanum. Harumframt kann ikki væntast, at hann sleppur í krókin at liggja, tí har er ikki pláss.

## Landið upp í

Formaðurin í Havnarnevndini vísur á, at á Trongisvágsfjørði er landið sinnað at betala alla samferðsluhavnina, nú nýggj suðuroyarferja skal byggjast

Tí heldur hann eisini, at landið eigur at betala tann partin av útbyggingini, sum krevst til at nýggja Suðuroyarferjan fær lagt at í Havn

– Skulu vit tryggja Smyrli fast pláss undir øllum umstøðum, verður neyðugt, at landið rindar sín part av útbyggingini.

Hann sigur, at yvirhøvur verður talan um útbyggingar, sum koma øllum landinum til góðar.

Tí heldur Býráðið heldur ikki, at útbyggingin eigur at verða roknað upp í útbyggingarkvotuna hjá Tórshavnar Kommunu.

– Tórshavnar Kommuna sleppur at byggja út fyri 70 milliónir um árið, ella har á leið. Innanhýsis hevur Býráðið gjørt av, at Tórshavnar Havn skal byggja út fyri 19 milliónir.

– Sostatt er tað greitt, at skulu hesar útbyggingar takast av kvotuni, verða tær als ikki lidnar til tíðina.

Hann sigur eisini, at nógvar aðrar útbyggingar liggja á láni, so tað er ógvuliga lítið hugsandi, at Tórshavnar Havn fær ein størri part av kvotuni enn tær 19 millióninrnar.

Tað er somuleiðis óhugsandi, at Býráðið fer at leggja aðrar íløgur til viks, fyri at leggja størri orku í at byggja havnarlagið út.

– Tað er tann púra greiða støðan hjá býráðslimum, at tað verður ikki talan um, at lata Tórshavnar ein størri part, ella at leggja annað til viks fyri at byggja havnina út.

Verður útbyggingarkvotan tí ikki hækkað, fer tað at fáa álvarsligar avleiðingar fyri bæði skipini, sigur Jákup Suni Joensen

Annars fýlist hann at, at Kommunan enn ikki hevur fingið at vita frá Landsstýrið, hvussu nógv, hon fær at byggja fyri tey komandi árini.

# hygg & hoyr



**Frá fríggjadegi 14. september til hósdagin 20. september**

## Eva og Ádam




Svensk dramarøð fyri størri børn byrjar aftur í kvøld 14. september.

Ádam er 11 ára gamal og skal byrja í einum nýggjum flokki í einum nýggjum skúla. Hann kennir ongan, men Alexander tekur sær av honum og gerast teir báðir bestu vinmenn. Eva gongur í sama flokki sum teir báðir. Hon heldur, at Ádam er nokkso fittur, sjálvt um hann er eitt sindur sjai. Vinkona hennara Annika hevur føðingardag í næstum, so tær báðar skipa fyri einari veitslu, har foreldrini ikki eru við og bjóða øllum flokkinum. Tað kemur rættilig ferð á mussaríið, tá Alexander skýtur upp, at tey fara at spæla »Tann russiska grindin«.

Leikrit: Johan Unenenge og Måns Gahrton

Leikarar: Eva: Ellen Fjaestad, Ádam: Carl Robert Holmer-Kårell, Alexander: Pablo Martinez o.o.

## Tve-kampen




## Frítíð og náttúra




## Fótbóltslandskappingin




## Grisk – når det gælder




## Robinson Ekspeditionen 2001

